# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Johannes Mortensen 95

Týsdagin 16. mars verður Johannes Mortensen, trúðboðari, á Argjum 95 ár.

Foreldrini hjá Johannesi vóru Rachel og Mortan Mortensen á Geil á Argjum. Tey fingu tilsamans 12 børn.

Sum flestu ungir dreingir tá fór Johannes til skips. Síðani fór hann til Íslands, har hann arbeiddi á bóndagarði í tvey og eitt hálvt ár. Kom heimaftur og fór hann í smiðjulæru hjá bróðrinum Palla í Vági.

Í 1937 fór Johannes til Danmarkar, har hann fekk arbeiði hjá einum smiðjumeistara í Højen norðanfyri Svendborg, og har varð lívsleið hansara løgd. Hesin smiðjur var missiónsmaður, og í bygdini var dugnaligur prestur, sum tók sær av teimum ungu. Hann hevði bibliutímar saman við teimum heima hjá sær sjálvum og dugdi sera vær at fara við teimum.



Johannes ynskti nú at fáa eitt arbeiði, sum var innan tað kristna virki, og ráddi presturin honum til at fara á diakonskúla í Århus. Hann kom hagani í praktikk eina tíð á Hald uttan fyri Viborg, har hann møtti Elmu, sum hann giftist við í 1943. Tá var hann liðugur sum diakonur, fekk hann arbeiði sum trúboðari innan KFUM og K og Indre Missón í Tønder í Suðurjyllandi og seinni í Jelling.

Í 1949 fluttu tey til Havnar, har Johannes var biðin um at vera KFUM skrivari. Hann var við til at byggja KFUM, sum varð vígt í 1952. Við í arbeiðinum sum KFUM skrivari var eisini umsiting av Kristiligt Ungmannablað.

Á KFUM var hann til 1960, tá tey fluttu til Fuglafjarðar sum trúboðarapar, og í 19 71 gekk leiðin til Vestmanna. Hóast Johannes varð pensioneraður sum 70 ára gamal, hevur hann verið virkin í missiónsarbeiðinum í mong ár.

Elma og Johannes fingu sjey børn: Gertrud, Ragnhild, Hjørdis (sum bert gjørdist 2 ár), Karin, Gudmund, Sólbjørg og Jens Mortan. Elma andaðist fyri 9 árum síðani, 87 ára gomul.

Føðingardagurin verður hildin saman við familjuni.

*- red*

## Blaðstjórin fer í farloyvi





*Meðan Jan Müller er í farloyvi røkir Eirikur Lindenskov uppgávuna sum fyritaks- og ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum*

Jan Müller, fyritaksstjóri og ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, er farin í farloyvi næsta hálva árið. Jan Müller hevur leingi arbeitt við einum bókaverki um føroysku oljuvinnuna, og næsta hálva árið fer hann at gera hetta burturav.

Jan Müller hevur innlit í føroysku oljusøguna sum fáur, tí eingin hevur skrivað so nógv sum hann um evnið. Hann hevur fylgt við og skrivað um evnið, síðani byrjað var at tosa um føroyska oljuvinnu longu í sjeyti- og serliga áttatiárunum.

Meðan Jan er í farloyvi røkir hin blaðstjórin uppgávuna sum fyritaks- og ábyrgdarblaðstjóri.

Lesið Sosialin - so eru tit við

†

### Andlát og jarðarferðir

**Maria Jørgensen, fødd Olsen, ættað úr Hvalvík, búsitandi í Rønne á Bornholm**, andaðist mikukvøldið, 89 ára gomul.

### Merkisdagar

**60 ára føðingardagur**
Mikudagin 7. apríl 2010 verði eg 60 ár, føðingardagsveitslan verður hildin í Skálanum í Klaksvík, leygardagin, 10. apríl kl. 19. Tey sum ynskja at gleða meg við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin at boða frá við at ringja ella senda sms til telefon 211988, ella við t-posti til isak@football.fo helst áðrenn 5. apríl. Heilsan Ísak Mikladal, Klaksvík.

**85 ára føðingardagur**
Mánadagin 15. mars verður Sigurd Sofus Nybo, Hósvík, 85 ár.

**95 ára føðingardagur**
Týsdagin 16. mars verður Johannes Mortensen, trúboðari, Argir, 95 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 23. mars hava Heidi og Jan Abrahamsen á Strondum silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Kelduni frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 17. apríl hava Helga og Jørgin Gleðisheygg Nes, Gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík, kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tey ið vilja gleða okkum við at koma verða biðin um at siga frá innan 8. apríl á tlf. 447160 ella 270876

**Diamantbrúdleyp**
Ruth og Robert á Lakjuni, Fuglafirði, halda diamantbrúdleyp í bygdarhúsinum í Leirvík 26. mars kl. 18.30. Tey, ið ynskja at gleðast saman við teimum hetta kvøld, biðjast siga frá, seinast hósdagin, tann 18. mars, á tlf. 444 332, fartelefon 744 332 ella við telduposti hg.vang@kallnet.fo

**Brúdleyp**

Leygardagin 27. mars kl. 12 giftast í Kelduni í Skálafirði, Birita Ingolfsdóttir Heinesen, Norðagøtu og Levi Tróndarson Nybo, Hvítanes. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 16. Opið hús verður kl. 21 í Oasuni, Kirkjustrætið 4, Hoyvík, har øll eru hjartaliga vælkomin at heilsa uppá brúðarparið.

**Brúdleyp**

Leygardagin 27. mars giftast Linda Ziska Jacobsen, Tórshavn og Gunleif Lyngvej Poulsen, Sandvík. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 11. Móttøkan verður í Miðlahúsinum í Tórshavn frá kl. 13-15.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Prógv**
9. mars tók Leivur Persson, Hoyvík prógv sum løgfrøðingur (cand.jur. ) á Universitetinum í Keypmannahavn.

### Dagurin

15. mars. Sakarias, deyður ár 752. Hann var grikki, ið var valdur til páva í 741. (Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*